## USA ávarar Kina

Í amerikanska verjumálaráðnum Pentagon eru tey ørkymlað av, at Kina er í ferð við at menna tøkni, sum kann skeikla teirri hernaðarligu javnvágini í Asia. Sum skilst eru tey í Pentagon serliga ivingarsom um kinesisku menningina innan kjarnorku-, rúmdar- og cyberkrígsførslu, skrivar AP. Í teirri seinastu frágreiðingini frá Pentagon til Kongressina stendur, at evnini hjá Kina at reka kríggj á fjarskotnum leiðum eru framvegis avmarkað, men at landið fram við við at menna hernaðarliga tøkni, sum kann órógva javnvágina í Asia. Kinesiska stjórnin kunngjørdi í fjør, at játtanin til hernaðarmál verður økt smá 18 prosent.



## Forseti í rættinum

Í Taiwan fór dómsvaldið í morgun undir at viðgera eitt rættarmál ímóti fyrrverandi forsetanum Chen Shui-bian., sum er ákærdur fyri svik. Sambært ákæruvaldinum svikaðu forsetin og familja hansara fyri minst eina hálva millión dollarar ta tíðina, hann var forseti. Chen heldur uppá, at hann er ósekur, og hann sigur seg vera offur fyri einari politiskari ráðagerð. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa lívlangt fongsul, skrivar AP. Chen Shui-bian fór úr forsetaembætinum í fjør, og síðani hevur hann funnist hvassliga at eftirmanni sínum og hansara royndum at bøta um viðurskiftini við Kina.




*Fegin starvsfólk á Tryggingarfelagnum Føroyar, sum vunnu eina ferð fyri 20 fólk við Norrønu*

*Mynd Jens Kristian Vang*

# Tryggingarfelagið vann Firmakappingina

**61 fyritøkur tóku lut í stóru firmakappingini hjá Rás2**

SPURNARKAPPING
*Heri Simonsen*
*heri@sosialurin.fo*

Í gjárakvøldið var eitt satt finalubrak í Miðlahúsinum. Umframt tey 20 fólkini frá Gráa Pakkhúsi hjá Skipafelagnum og Tryggingarfelagnum Føroyar, sum skuldu taka lut í finaluni, vóru meir enn hálvthundrað stuðlar, sum settu veruligt lív í. Bæði liðini høvdu firmafløgg við, og Tryggingarfelagið royndi eisini at seta dám á, við at hava karamellur við, sum høvdu búmerkið hjá fyritøkunum. Bæði liðini høvdu gjørt sær slagsangir, sum tey fýrdu av.

Í Miðlahúsinum rungaði: - »FaroeShip, FaroeShip, vit vinna Norrønutrip« og »Tryggingin, Tryggingin, vit vinna vinningin«. Maður og kona vóru á hvør sínum liði. Jens Hjørleif Hansen var liðskipari hjá Tryggingarfelagnum, og konan, Durita Johansen var á liðnum hjá Gráa Pakkhúsi, so har var so, ið hvussu er ein vinnari í húsinum.

Talan gjørdist um eina spennandi kapping. Liðini fingu 6 ljóðspurningar, og 5 lisnar spurningar í part. Gráa Pakkhús gav tryggingarfólkunum ein skarpan gang, men mátti lúta at enda. Endin var, at Tryggingarfelagið Føroyar vann finaluna. Av 11 møguligum stigum fekk Tryggingarfelagið Føroyar 8 stig, meðan Gráa Pakkhús fekk 7 stig.

Tryggingarfelagið var á odda 4-2 og 5-3, men Gráa Pakkhús kláraði at toga seg uppá javnleik 7-7. Men Tryggingarfelagið koyrdi tann seinasta spurningin í hús, og var rómurin øgiligur, tá staðfest var, at tey høvdu vunnið 8-7, og harafturat eina ferð fyri 20 fólk við Norrønu. Og tey sluppu at avreagera eina løtu, afturvið tónunum til »We are the champions«.

Jákup Sverri Kass, marknaðarleiðari hjá Smyril Line handaði tann stóra vinningin til tey ovurfegnu starvsfólkini hjá Tryggingarfelagnum. Nú er so bert eftir hjá Tryggingarfelagnum at velja út, hvørji fólk skulu við Norrønu seinast í mai.

Handilin »Inn« á Landavegnum í Havn læt gávubrøv til páskaregg til teir 10 luttakarnar á tapandi liðnum, sum sostatt ikki fóru heim við ongum. Bæði liðini høvdu mannað seg við góðum stuðlum, sum syrgdu fyri at seta lív í eina spennandi og dramatiska finalu. 61 fyritøkur tóku lut í Firmakappingini.